## Badmintonhøllin latin upp

Leygardagin lat nýggja Badmintonhøllin í Klaksvík upp, har nógv spennandi tiltøk vóru á skránni. Jákup Anthoniussen bjóðaði vælkomin, og Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri og Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, søgdu nøkur orð. Nógvur tónleikur var á skránni. Klaksvíkar Hornorkestur, bólkar frá Virkishúsinum, Country-Bólkurin, KFUM-kórið, Kvartettin í Betesda og Vitin sungu og spældu. Eisini var borðhald serligur badmintondystur.

Mynd: Dávur Winther



# H71 styrkir sær støðuna

**Ikki sørt av spenningi var undan dystinum í Hoyvíkshøllini í dag. H71 kundi við einum sigri tryggja sær triðjaplássið, og fara nakað frá teimum niðaru liðunum**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Vestmenningar byrjaðu dystin betur, og løgdu seg á odda við trimum málum. Hetta mynstrið hevur verið vælkent hjá H71, og hevur verið júst tað, sum teir mangla í at vunna. Hetta vendi tó beinanvegin, og H71 skoraðu fimm mál áðrenn VÍF aftur kom á máltalvuna til støðuna 5-4. Síðan gekk bara betur og betur hjá H71, og leiðslan tók at økjast javnt. Tá 20 min. vóru farnir var støðan 9-7 til H71. Vestmenningar steðgaðu fullkomuliga upp, og tá tað var komið til hálvleik var H71 frammanfyri við 8 málum, og støðan var 17-9.



*Eyðun Højgaard verður hildin av VÍF-spælara, meðan Sámal Joensen hyggur at*

### Tætt móti endanum

Tá annar hálvleikur byrjaði, helt H71 fram við sama góða spæli. 10 min. inn í annan hálvleik vóru 10 mál á muni og støðan var 23-13. So kom fullkomuliga stígur í hjá okkara monnum. VÍF fór at verja longur frammi og meira ágrýtið. Hetta dámdi ikki okkara monnum og gjørdust teir skjótt ráðaleysir og lítið framfýsnir. Dysturin gjørdist heilt spennandi móti endanum, og støðan gjørdist bæði 25-24 og 26-25 áðrenn dysturin loksins endaði, við einum eittmáls-sigri til H71. Úrslitið gjørdist 27-26 til H71. Gongdin minti um fyrra dystin í Vestmanna millum somu lið. Tá dró VÍF longra stráðið.

**FAKTA**

**H71-VÍF 27-26 (17-9)**
**Málskjúttar:**
**H71:** Esbern Paturson 11 (5), Dánjal Tórgarð 5, Bárður Brimvík 3, Halgir D. Olesen 3, Janus Sørensen 3, Niels V. Niclasen 1, Eyðun Højgaard
**VÍF:** Agnar Joensen 9, Sámal Joensen 6 (3), Áki Olsen 3, Niels Andreasen 3, J. Andreasen 3, Bjarti Hansen 2
**Brotskøst:** H71 5, VÍF 3
**Útvísingar:** H71 4, VÍF 3
**Dómarar:** Ragnar & Rúni

# Fyrstu stigini komin í skjáttuni

**KÍF hevði undan vikuskiftisdystinum ikki fingið nakað stig í hesum kappingarárinum, og havnamenn úr Kyndli vildu geva teimum reyðu úr Kollafirði skarpan gang. Men tá avtornaði høvdu Kollfirðingar fingið skavað tvey stig til sín við einum 30-29 sigri.**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Áðrenn dystin í vikuskiftinum vóru Kollfirðingar ikki komnir á stigatalvuna, men teir vildu tað ørðvísi, og kempaðu seg til sigurs m.a. við stórslignum spæli frá málverjanum Óla Kristiani Djurhuus. Annars hoyrdist úr Kollafirði at KÍF spældi betur hondbólt enn teir hava gjørt í langa tíð, og at glottar eru at síggja. So vónirnar um stig í komandi dystum eru góðar.

Dysturin var nøkunlunda javnur, men málmansspælið hjá kollfirðingum var ov stór forðing fyri grønu kyndlamennirnar, ið máttu taka til takkar við einum eitt-máls ósigri.



**FAKTA**

**KÍF-Kyndil 30-29 (20-15)**
**Málskjúttar:**
**KÍF:** Damir Oros 10 (4), Gert Hansen 6, Rógvi Weihe 5, Niklas Reginsson 3, Dejan Jankovic 3, Jóan Pauli Olsen 1, Emil Petersen 1, Mirko Milenkovic 1.
**Kyndil:** Finnur Hansson 7 (1), Hjalti Jacobsen 5, Ken Zachariassen 5, Rani Ellingsgaard 4, Bárður Johannesen 3 (1), Hans Áki D. Christiansen 3, Regin Fossaberg 2
**Brotskøst:** KÍF 4, Kyndil 5
**Útvísingar:** H71 3, Kyndil 3
**Dómarar:** Kristian Johannesen & Dánjal Samuelsen

# Neistin festi ikki í StÍF fjúsið

**Í einum tøttum og til tíðir rótutum dysti, megnaði StÍF at koppa oddaliðnum, áðrenn teir lupu ov langt frá hinum liðunum í Atlantic Airways kappingini**



*Ingi Olsen í nærdysti við Danni Syhler*

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

StÍF løgdu út í kvøld við einum uppleggi, ið var greitt at síggja. At fáa verjuna at standa stinna og síðani dúva uppá møguleikar hinvegin. Og ikki kann sigast annað enn at tað virkaði til fulnar, tí við einum sera góðum og vælskipaðum verjuspæli og ikki minni væl uppløgdum málverja í Marian Cirloganescu, megnaðu strandingar at verja borg og senda havnamenn heim aftur við 21-26 tapi. Hálvleikstøðan var 15-12 til heimaliðið.

### Marian í serflokki

Dysturin gekk javnt fyri seg frá byrjan til enda, og var tað ikki fyri framúr vælspælandi málverjan hjá strandingum, høvdu Neistamenn kanska komið enn nærri. Hetta, umframt at rutineraði Ingi Olsen fekk ein smáskaða og noyddist út, tíðliga í øðrum hálvleiki, var við til at avgera dystin til fyrimun fyri StÍF.

**FAKTA**

**StÍF-Neistin 26-21 (15-12)**
**Málskjúttar:**
**StÍF:** David Edvardsen 5 (3), Sveinur Justinussen 4, Borgar Danielsen 3, Danni Syhler 3, Jón Rasmussen 3, Rúni Niclasen 3, Leivur Justinussen 2, Bárður Danielsen 2, André Danielsen 1.
**Neistin:** Roar Dalsgarð 9 (4), Karl H. Olsen 4, Blagoje Buha 3, Jugoslav Djumic 3, Ingi Olsen 2.
**Brotskøst:** StÍF 4, Neistin 4
**Útvísingar:** StÍF 3, Neistin 5
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen